Minningarorð um pápa mín
Tór Henriksen

Nú jólini nærkast kann eg ikki lata vera við at lata tankarnar fara til pápa mín, sum farin er í hesum árinum.

Hetta verða so fyrstu jól, ið tú góða mamma og vit øll eru uttan hann, um hann ikki gjørdi so nógv um seg, er saknurin stórur.

Eg má siga, at eg eri sera takksom fyri, at mær untist við familju at verða saman við tær og mammu síðstu jól. Tað var sera hugnaligt. Hetta var fyrstu ferð, eg var og helt jólaaftan saman við tykkum í 22 ár. Lítið vistu vit, at tað skuldi verða síðstu jól hjá tær babba. Í nógv ár var tú so sjúkur og troyttur og tú bar tað so stillisliga, ikki tú gramdi teg, sjávlt um tú hevði nógva pínu og var so trongur. Eg vil siga tað soleiðis, akkurát sum tað stendur í bíbliuni: tú bar tað so stillisliga eins og lamb, ið ikki lat upp munn sín. Av tí sama bar tú alt so einsamallur, vit kundu so lítið hjálpa. Men tú góða mamma, tú hjálpti so væl tú kundi og hugnaði so væl um hann. Tað eru vit tær sera takksom fyri.

Tit fingu 6 børn, 4 gentur og 2 dreingir, eisini fingu tit 25 abbabørn og 7 langabbabørn. Tað var tú so ógvuliga stoltur av.

Ja, bert 72 ára gamalt, tá tú ikki orkaði stríðið meira, sjálvt um um eg sakni teg nógv, unti eg tær væl at sleppa vekk herfrá heim í tær ævigu bústaðir, har ongin kreft, bara gleði. Eg sigi fyri meg, eg ætli mær at møta tær aftur har heima.

Og til góðu mammu, má Harrin hjálpa tær í sorgini og styrkja teg til hvønn dag.

Eg vil hervið lýsa frið yvir minnið um babba og siga takk fyri alt.

Heilsan Anna Petra

Lag: Mánin hann skein

Faðir vár tú sum
í himni er, heilagt
verði navn títt, komið
ríkið títt, verði vilji
tín so sum í himli
er gev oss í dag várt
breyð, ja alla tíð.

Leið okkum ei í freistingar
men frels oss
frá tí ónda, tí títt
ríkið, valdi og heiðurin og alla tíð, amen.
Halleluja ja amen.

Restorffs Bryggjarí á nýggjar hendur:

Taka kappingina upp við danska ølið

Johan Mortensen og Óla Svenn Nolsøe hava keypt meirilutan av partabrøvunum í Restorffs Bryggjarí og fara nú av álvara at taka kappingina upp við tað innflutta ølið. Teir halda tað avgjørt vera pláss fyri tveimum bryggjaríum í Føroyum. Kappingarneytin verður ikki Føroya Bjór men innfluttur fløskurnar sigur Óla Svenn Nolsøe, sum verður stjóri á meira enn 150 ára gomlu havnarfyritøkuni

VINNA
Jan Müller

Eitt tað elsta bryggjaríið í danska kongaríkinum, Restorffs Bryggjarí við Landavegin í Havn hevur skift eigara. Óla Svenn Nolsøe og Johan Mortensen í Havn hava keypt 57% av partabrøvunum í fyritøkuni frá Lenu Mørk og Åge Andersen og fara við keypinum at menna søluna av tí so kenda og vælsmakkandi sodavatninum og ølinum. -Vit ætla okkum ikki at kappast við Føroya Bjór, men heldur at taka kappingina upp við ta innflutta danska ølið og sodavatnið sigur Óla Svenn Nolsøe, sum verður stjóri á bryggjaríinum í høvuðsstaðnum. Hann vísir á, at teir fara at halda fram við tí góða samstarvi, sum hevur verið við Føroya Bjór á fleiri økjum og heldur fyri, at tað er pláss fyri tveimum bryggjaríum í Føroyum. Marknaðurin er stórur nokk til bæði tvey og eiga tey at leggja seg eftir at gera eina so góða vøru, at føroyingar minka um keypið av útlendskum øli og sodavatni. Ola Svenn Nolsøe heldur, at bæði føroysku bryggjaríni skuldu føla seg sum kollegar heldur enn sum kappingarneytar. Hann heldur eisini, at føroyska ølið er fult á hædd við tað danska. Tað er henda vitanin, sum má koma longur út til fólk. Sama er galdandi fyri sodavatnið.

Óla Svenn Nolsøe, sum í dag er stjóri hjá bilasøluni Ford, fer at røkja bæði stjórastørvini at byrja við. Við hesum nýggja arbeðinum kemur hann bókstaviliga sagt heimaftur til røtturnar, nú barnaheim hansara er næsti granni hjá Bryggjaríinum.

Óla Svenn Nolsøe sigur, at hugskotið til at keypa bryggjarríið kemur frá Johan Mortensen, sum annars ikki er nakar ókendur vinnulívsmaður. Hann var leingi stjóri hjá fiskasøluvirkinum Marr & Company og hevur sseinastu árini verið umboðsmaður hjá Amerada Hess og er í dag stjóri á deildini hjá oljufelagnum Anadarko.

Teir báðir hava stovnað felagið Camelot, sum skal reka bryggjaríið. Óla Svenn Nolsøe sigur, at fyritøkan er væl rikin og er hon nútímansgjørd, eitt nú hevur ráðgevi úr Danmark ment vørurnar soleiðis at teir nú fara at leggja seg eftir at menna søluna eisini. Nýggja stjórastarvið skuldi passsað sum fótur íhosu til útbúgvingina hjá Óla Svenn Nolsøe, sum er útbúgvin civilverkfrøðingur við matvøruframleiðslu sum sergrein.

Minningarorð um
Hannis Arge

30.september andaðist Hannis Arge 74 ára gamal.

Hannis giftist við Brynhild- ættað úr Miðvági- í 1949 og fingu tey fýra børn. Teimum untist at vera gift í 52 1/2 ár og megnaðu at geva okkum eitt trygt og gott heim. Mamma tað er svárt hjá tær at hava mist kæra mann tín, tí tit vóru jú altíð saman.

Babba eg ynski bara at vísa mín longsul eftir tær, serliga nú tú ikki ert millum okkum hesi jól. Tað er so kensluborið, og lívið reflekterar aftur og aftur. Tað verður so tómligt, tá vit øll børn og abbabørn tíni fara oman til mammu jólaaftan at vera saman, og tú ikki verður millum okkum. Tú elskaði jú, at vit øll vóru saman henda dag, og stuttligt var, tá tú plagdi at deila jólapakkarnar út, tað var nakað serstakt.

Tað besta av øllum er tó, at tú, babba, var so glaður fyri størstu jólagávu av øllum- fyri jólaboðskapin- at Jesus kom niður av himli og varð føddur inn í henda heim sum menniskja og virkaði í 33 ár, til hann hevði fullført frelsuætlan Guds fyri alla mannaættina. Hesa gávu takkaði tú Gudi fyri, og jólaaftan syngur tú við tí himmalska kórinum og lovprísar Gudi fyri Jesubarnið.

Babba, eitt veit eg, og tað er, at vit síggjast aftur. Takk fyri alt mín elskaði pápi.

Dóttir tín Marita

Tøkk

Hjartaliga takk fái øll tit, ið sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá ið kæri maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

Tórbjørn Hentze,
á Argjum

lá sjúkur, doyði og varð jarðaður.

Hjartans tøkk øll tit, ið trúliga vitjaðu hann og bóðu fyri honum.

Hjartans tøkk øll tit, ið fylgdu honum til gravar. Øll tit, ið sendu blómur, kransar og peningagávur til Missiónshúsið við Landavegin.

Hjartans tøkk til Berg D. Joensen, prest, kirkjutænarar, sangarar og berarar og øll tit, sum á ymiskan hátt tóku eina hond í.

Harrin signi tykkum øll
og gevi tykkum eini gleðilig jól og signað nýggjár.

Fyri y avvar a i

Ingibjørg, Torfinn, Ragnar og Rúni

Manningin á teim stóru nótabátunum:

Dagsløn 4000 krónur

Tað hevur loyst seg at siglt við nótabátum í ár

FISKIVINNA
Justinus Leivsson Eidesgaard

Nótabátarnir hava gjørt eitt stak gott ár í ár. Og tað merkist eisini hjá teimum sum hava siglt við hesum skipum. Hvussu stórur manningarparturin er, kann vera eitt sindur ilt at siga, tí tað velst um hvussu grammir menn eru og hvussu nógvar dagar teir eru við. Men roknað um pr. fiskidag, so hevur manningin á teim stóru nótabátunum fortjent yvir 4000 krónur um dagin.

Og teir stóru bátarnir talan eru um eita Norðborg, Tróndur í Gøtu, Christian í Grótinum og Krúnborg.

Norðborg hevur fiskað fyri millum 90 og 95 milliónir krónur. Norðborg er tann nótabáturin sum hevur fingið mest burtur úr fonginum. Hetta kemst av, at teir skera sildina umborð og á tann hátt virðisøkja hana.

Tróndur í Gøtu hevur fiskað fyri nakað yvir 80 milliónir krónur. Hann tekur 800 tons meira enn eitt nú Christian í Grótinum. Christian í Grótinum hevur avreitt fyri 80 milliónir krónur og Krúnborg hevur avreitt fyri beint undir 80 milliónir krónur.

Jupiter og Jón Sigurdsson hava avreitt fyri um 40 milliónir og Finnur Fríði og Saksaberg hava fiskað fyri 30 milliónir krónur.

Tann maðurin sum hevur verið mest við Norðborg hevur verið 205 dagar í sjónum. Hann hevur vunnið yvir 800.000 krónur í ár.

Nótabátarnir fara á makrel tvær tær fyrstu vikurnar í nýggja árinum og síðan verður farið at fiskað svartkjaft og lodnu. Lodnan verður fiskað í Barentshavinum og undir Íslandi.

Útróðrarmenn nummar tvey

Næstur til at vinna nógvan pening eru útróðrarbátarnir og serliga teir sum royna við línu. Vit hava í skrivandi løtu ikki nøkur endalig tøl, men manningarparturin á einum av teimum stóru útróðrarbátunum, sum royna við línu í Klaksvík í ár er yvir 400.000 krónur.

Eldorado var ballingartúr í Nólsoy

Justinus Leivsson Eidesgaard

Upplýsningarnir seinasta hósdag, sum vakthavandi á Vaktar og Bjargingartænastan hevur um útróðrarbátin Eldorado úr Klaksvík, ið var saknaður seinasta mikudag passaðu slett ikki. Vit skrivaðu at hann hevði sleipað Almu J.

Manningin á Eldorado fór av Borðoyarvík klokkan fimm seinnapartin mikudagin. Teir skuldu á Klaksvík og tað tekur ikki meira enn ein tíma at sigla. Men teir vóru ikki komnir fram klokkan 10 á kvøldi og fólk gjørdust bangin.

Brimil og Tjaldrið leitaðu og eisini ein bátur úr Klaksvík. Klokkan tvey um náttina hevði Tjaldrið samband við Eldoradu. Hann var tá staddur út fyri Rituvík á veg norður eftir. Teir høvdu verið úti í Nólsoy og ballast og høvdu sløkt telefonina.

Vaktartænastan sigur, at hendingin fær eftirspæl.